# Álit

# í

**ungdómstingsmáli nr. 4/2010: Uppskot til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um valrætt og valbæri**

Sandoyar Meginskúli hevur lagt málið fram tann 8. februar 2010, og eftir 1. viðgerð er tað beint í Rættarnevndina.

Nevndin hevur viðgjørt málið á fundi tann 8. februar 2010.

Nevndin hevur undir viðgerðini býtt seg í ein meiriluta og ein minniluta.

**Meirilutin** (Fríðunn Jacobsen, Kristian Martin Juul, Sára Petersen, Anfinn Kallsberg, Henrik Joensen, Sólrun Henrysdóttir, Birita Poulsen og Hergeir W. Lognberg) í nevndini heldur, at uppskotið sum heild er skilagott og tekur undir við viðmerkingunum hjá uppskotssetaranum, hvat viðvíkir aldurinum fyri valrætti. Við at seta aldurin niður fyri valrætt fær ungdómurin betri møguleika at hava sína ávirkan á fólkaræði.

Men nevndin heldur ikki, at aldurin til valbæri skal broytast. Sum 15 ára gamal gongur man enn í skúla. Um ein verður valdur inn í Løgtingið ella verður valdur til løgmann, so fær man tað torført við at røkja bæði sítt starv í skúlanum og sítt starv sum politikari. Antin kann man ikki røkja sína skúlagongd, ella hevur man ikki møguleika at luttaka á fundum og øðrum, tí at man má vera í skúla. Ein annar trupulleiki er eisini, at sum løgmaður hevur tú eisini myndugleika til at skriva undir lógir við meira, og tað kann elva til ein trupulleika, tí man er ikki myndugur sum 15 ára gamal.

Meirilutin er eitt sindur í iva um, hvørt man hevur skil fyri politikki, tá man er 15 ár. Tað er ikki altíð, at ein 15 ára gamal hevur skil fyri politikki og vandin er eisini, at man fylgir einum ávísum ráki og bara velur sum onnur, kanska eisini undir onkrum bólkatrýsti, og soleiðis ikki av síni politisku sannføring. Tískil mælir meirilutin til, at tað í skúlunum verður koyrt inn sum ein kravd lærugrein at fáa frálæru í politikki. Somuleiðis mælir meirilutin til, at Ungdómsting skuldið verið á hvørjum árið, soleiðis at ung fólk fáa betri kunnleika til ta politisku prosessuna og sleppa at hava ávirkan í samfelagnum.

Við hesum viðmerkingum ynskir meirilutin, at aldurin til valrætt skal vera 15 ár, ímeðan aldurin til valbæri skal vera 18 ár. Tískil setir meirilutin fram soljóðandi

**b r o y t i n g a r u p p s k o t**

Í § 2, stk. 2 verður sett inn, "valbær til Løgtingið eru tey, sum hava valrætt til Løgtingið og eru fylt 18 ár"

Við hesari broyting mælir meirlutin Ungdómstinginum til at samtykkja uppskotið.

**Minnilutin** (Katrin Dahl Hanusson og Sudarat Niyomtham) tekur sum heild undir við meirilutanum, men heldur at 15 ár er ein ov lágur aldur, og mælir tí til at broyta aldursmarkið at vera 16 ár.

Við hesum viðmerkingum setir minnilutin fram soljóðandi

**B r o y t i n g a r u p p s k o t**

1) Í § 2, stk. 1 verður “18” broytt til “16”
2) Í § 2, stk. 2 verður sett inn, “valbær til Løgtingið eru tey, sum hava valrætt til Løgtingið og eru fylt 18 ár”

Við hesum broytingum mælir minnilutin Ungdómstinginum til at samtykkja uppskotið.

**Rættarnevndin, 9. februar 2010**

Birita Poulsen
formaður

Sára Petersen

Anfinn Kallsberg

Hergeir W. Lognberg

Kristian Martin Juul

Fríðunn Jacobsen

Katrin Dahl Hanusson

Sudarat Niyomtham

Sólrun Henrysdóttir

Henrik Joensen